## Fleiri løntakarar - uttan í fiskivinnuni



Í mars mánaði í ár vóru tað samanlagt 25.491 løntakarar í Føroyum. Hyggja vit aftur til 1990, so hava tað í tíðarskeiðnum ikki áður verið so nógvir løntakarar í mars mánaði. Í mun til mars 2006 eru tað 737 ella sløk 3% fleiri løntakarar í mars mánaði í ár. Verður hugt eftir teimum ymsu vinnugreinunum sæst, at vøkstur er í øllum uttan í fiskavinnu o.a. ráevninsvinnu. Her kann staðfestast ein minking uppá 229 løntakarar, í mun til mars mánað 2006. Størstur vøkstur í tali er innan privatar tænastuvinnur, har 382 fleiri vóru í vinnu. Í prosentum er vøksturin størstur innan byggivinnu o.a. tilvirking, har munurin er sløk 8 %.

## Gongur væl hjá Gongufelag

Eysturoyar Gongufelag telist millum tey virknu feløgini hesa ársins tíð. Tey skipa fyri túrum víða hvar í Eysturoynni, men leita sær eisini í aðrar oyggjar, m.a. Norðoyggjar, Vágarnar og tær smærru oyggjarnar. Tey hava lagt eina fjølbroytta skrá til rættis fyri alt árið, saman við Kunningarstovuni í Runavík, og har ber til at síggja, hvagar leiðin ber næstu ferð. Tað kostar einans 150 kr. at gerast limur í felagnum. Túrarnir eru ymiskir í torleika, og tí verður frammanundan sagt, um talan er um ein lættan ella tungan túr. Sum skilst er ætlanin haraftrat at fara uttanlands í ár.

# Doktórs – interaktiv fotoverkætlan



**Leygardagin 23. juni hava 100 fólk í Tórshavn møguleika fyri at vera við í eini nýggjari fotoverkætlan hjá Mariannu Mørkøre & Mariu Arnell**

TÍÐINDASKRIV

Myndarøðin hevur heitið Doktórs og skal í stuttum avmynda 100 fólk í Tórshavn.

Hetta er ein interaktiv fotoverkætlan, har endamálið er at gera eitt listaverk, sum gevur fólki ein aktivan leiklut í mun til bert ein áskoðaraleiklut. Myndarøðin lýsir sostatt ikki eina inniliga listarliga, abstrakta kenslu hjá listafólkunum, men er heilt einfalt ein dokumentatión av, at tú hevur havt ein aktivan leiklut, sum verður settur í eitt listarligt høpi. Hetta er sostatt ein konkret myndatøka, sum eisini skal vísa eina ítøkiliga listarliga tilgongd.

Mannagongdin er, at ein og hvør í aldursbólkinum 8 ár og uppeftir kann luttaka, annars eru eingi krøv til útsjónd ella klæðir. Marianna og Maria taka myndirnar í hølunum hjá Lützens Foto, Sjúrðargøta 8. Byrjað verður kl. 12, leygardagin 23. juni, og opið verður til 100 fólk hava latið seg avmyndað. Myndatøkan tekur í mesta lagi 10 min. fyri hvønn.

Doktórs verður sýnd á ólavsøkuframsýningini í Listasavninum, sum Unglist skipar fyri.



# National Geografic á Vestmanna

**Talan er kortini ikki um kendu sjónvarpsrásina, men um eitt ferðamannaskip, ið nevnist National Geographic Endeavour**

FERÐAVINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hóast skipið hevur navn eftir kendi sjónvarpsstøðini, so er einki samband ímillum eigara og sjónvarpsstøðina.

Tað er Lindbland Expedition sum leigar skipið, men hetta er helst bara fyri at marknaðarføra National Geografhic. Aftur fyri hevur sjónvarpsstøðin tvey fólk umborð á ferð kring knøttin, sigur Halgir Dahl Olesen frá Faroe Ship, sum umboðar skipið í Føroyum.

Manning telur 79 og ferðafólkini eru 103, tey flestu amerikanarar. Tó eru ein íri, tríggir canadiarar og ein italieni.

Skipið lág uttan fyri Mykinesi í fyrradagin og kom á Vestmanna í gjár. Í dag fara nøkur av ferðafólkunum útferð undir Vestmannabjørgini, meðan onnur fara bussútferð.

National Geographic Endeavour fer av Vestmanna aftur í dag klokkan 14 og kemur á Havnina klokkan 17, har ferðafólkini koma umborðaftur.

Lesið Sosialin -so eru tit við!

## Hvítir fjallatindar á hásumri

**- Tað verður framvegis kalt. Og í næstu viku er ikki óhugsandi, at hvítir fjallatindar verða at síggja, sigur veðurmaðurin Petur Skeel Jacobsen**



*- Veðrið verður gott, men kuldi er framvegis í luftini, sigur Petur Skeel*

Tað verður framvegis høgætt teir komandi dagarnar.

Í morgin verður landnyrðingur, og onkur sólarglotti, men eisini møguleiki fyri sirmi. Hitin verður um millum 8 og 11 stig.

Sunnudagin verður sama veðri, okkurt ælið, men tað verður nakað kaldari, niður í 5 stig.

Mánadagin, týsdagin og mikudagin verður hann norðan og landnyrðingur í ættini, og hann minkar hitan enn meiri – heilt niður í 4 hitastig.

- Veðrið verður tað sama teir fyrstu dagarnar í komandi viku, sigur Petur Skeel.

Og tá er ikki óhugsandi at tindar fara at hvítna, hóast vit eru farin at nærkast juli mánaði.

**sb.**

Sosialurin Sosialurin i